# Stórar avbjóðingar við markið

**Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum er við, tá BG og Dong í august fara undir at bora ein brunn hinumegin markið. Annars verður sett á skamt frá markinum í hesi vikuni. Talan er um lovandi Cambobrunnin**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Í hesi vikuni verður sett á tann fyrsta av tilsamans trimum nýggjum brunnum skat frá føroyska markinum, á bretska landgrunninum. Talan er um Cambo /Lindisfarne prospektini. Ein brunnur varð boraður her fyri árum síðani og vísti seg at vera eitt fund. Nú skal so kannast, um talan er um lønandi fund. Keldur vilja vera við, at góðir møguleikar eru fyri, at henda boringin verður væleydnað. Tað eru Amerada Hess, ChevronTexaco, Dong og OMV, sum eru við í boringini. Borað verður við tí sera framkomna West Navigator boriskipinum. Eftir hesa boringina verður farið nakað longur norður at bora Rosebank/Lochnagar, prospektið. Tað er eisini lovandi, og har eru ChevronTexaco, Statoil, Dong og OMV við.

Triði brunnurin, sum helst verður boraður í summar er Bedlington prospektið, ið liggur longu syðri. Har er tað BG, sum er fyristøðufelag, umframt at Dong og Atlantic Petroleum eru við. Parturin hjá føroyska felagnum er 1%, meðan BG og Dong hava ávikavist 82 og 17%. Upprunaliga átti Amerada Hess ein stórar part av loyvinum, men seldi herfyri sín part til BG. Ein "letter of intent" sáttmáli er gjørdu við Ocean Rig um at Eirik Raude, boripallurin skal bora í august.

Í løtuni verður borað nærhendis Laggan, ið er eitt gamalt gassfund. Vísir tað seg, at fundið er lønandi, so kann tað eisini fáa stóran týdning fyri menning av Atlantsmótinum.



*Á kortinum síggja vit (pílarnir) teir tríggjar brunnarnar, sum verða boraðir í summar.*



*Boripallurin Eirik Raude, sum skal bora ein brunn hinumegin markið í august. Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum er við*


FØÐINGARDAGUR

hjá Bassa



Fiska tær eina spennandi gávu á føðingardegnum og fá eina ballón frá Bassa

Bassi vitjar á deildum okkara hesar dagar

**Við Gøtugjógv**
Týsdagin 25. mai 12.00–13.30

**Í Runavík**
Mikudagin 26. mai 14.00–16.00

**Í Miðvági**
Hósdagin 27. mai 14.00–16.00

**Í Fuglafirði**
Týsdagin 25. mai 14.00–16.00

**Í Sørvági**
Hósdagin 27. mai 12.00–13.30

**Í Vestmanna**
Fríggjadagin 28. mai 14.00–16.00

**Á Strondum**
Mikudagin 26. mai 12.00–13.30

FØROYA SPARIKASSI

REPROZ


## Hundar og postboð hittast

Hundar og postboð plaga ikki at vera bestu vinir, men nú gera Post Danmark og felagsskapurin Dyrens Beskyttelse eitt átak fyri at broyta hetta.

Í Gilleleje og Helsinge verða tað í dag tiltøk, har postboð sleppa at hitta nakrar av sínum kundum, sum eiga hundar, og hetta skal verða við til at broyta um støðuna.

Í fjør vóru 38 postboð í Danmark bitin av hundi, og fyri tveimum árum síðani var talið 46.

## Skeiv lýsing

Í leygardagsblaðnum var av misgáum ein lýsing frá Mentmálaráðnum komin við, sum ikki átti at verið í blaðnum. Talan var um eina lýsing, ið fyrr hevur verið í blaðnum, sum av einhvørji orsøk var komin umaftur. Rætta lýsingin var av somu orsøk ikki við.

Vit umbera mistakið.

**Blstj.**




# Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 2.0 Diesel GX** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000, fyrr 72.000,- **nú 59.000,-** | **Opel Corsa 1.7DT Comfort** gráur, árg 2002, 5 hurðar, km. 28.000 **125.000,-** |
| **Nissan Almera 1.8 Elegance** bláur, árg 2000, 5 hurðar, km 52.000 **99.800,-** | **Opel Corsa 1.2** grønur, árg. 2002 5 hurðar, km. 31.000 **v/mvg 99.000,-** |
| **Nissan Primera 1.6 Player** svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000, fyrr 67.000,- **nú 59.000,-** | **Saab 9-3 TiD 2.2** svartur, árg 2001, 5 hurðar, km. 35.000 **195.000,-** |
| **Nissan Terrano 3.0 Di Sport Van** grønur, árg 2002, 3 hurðar, km. 25.000 **199.700,-** | **Honda Accord 1.8i** grønur, árg 1998, 4 hurðar, km. 69.000 **110.000,-** |
| **Peugeot 206 XR 1.4** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 58.000 **108.000,-** | **Honda Accord 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000, fyrr 155.000,- **nú 129.000,-** |
| **Peugeot 306 Diesel 1.9** grønur, árg 1995, 3 hurðar, km. 162.000 **55.000,-** | **Ford Escort** bláur, árg 1996, 4 hurðar, km. 54.000 **59.000,-** |
| **Opel Astra 1.6 16V** gráur, árg 2000, 4 hurðar, km. 52.000, fyrr 112.000,- **nú 99.000,-** | **Renault Megane 1.6** grønur, árg 2000, 5 hurðar, km. 68.000 **98.000,-** |
| **Opel Vectra 1.7 DT** reyður, árg. 1996, 4 hurðar, km. 195.000 **69.000,-** | **Skoda Octavia 1.6** gráur, árg 1997, 4 hurðar, km. 102.000 **99.000,-** |
| **Opel Vectra 2.0 DT Station Car** svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000, *sýn 24/03/04* **nú 85.000,-** | **Hyundai Accent 1.5 AirCon** gráur, árg 2000, 5 hurðar, km 92.000, sýnaður 14. mai 2004 **nú 79.000,-** |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

Sosialurin 341800

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61


**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

# Endurlýsing

# Varaskúlastjórastarv í Vestmanna skúla

**Starvið sum varaskúlastjóri í Vestmanna skúla verður lýst til setanar frá 1. august 2004.**

**Vestmanna skúli hevur 202 næmingar í 1. - 10. fl. 22 lærarar starvast í skúlanum.**

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum í Streymoyar skúladømi I við fyribils tænastu í Vestmanna skúla. Tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 31.1 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum liggur á heimasíðuni www.mmr.fo, skal vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi týsdagin 25. mai 2004.

Umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

**Tórshavn 6. mai 2004**

**Mentamálaráðið - Hoyvíksvegur 72**
Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 355050 · Fax 355055
e-postur: MMR@MMR.fo

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

# Frítíðarskúlin í Sørvági

**søkir eftir einum deildarleiðara at byrja 16. august 2004**

Frítíðarskúlin, sum er ein deild undir barnagarðinum Sýslan í Sørvági, søkir eftir einum deildarleiðara at arbeiða 35 tímar um vikuna.

Deildarleiðarin, sum skal hava námsfrøðiligt prógv, hevur ábyrgdina av tí dagligu leiðsluni á frítíðarskúlanum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til Borgarhjørt Larsen, varaleiðara tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera okkum í hendi seinast 10. juni 2004.

**Barnagarðurin Sýslan**
FO-Sørvágur


# Kosmetologur

Søkt verður eftir einum kosmetologi skjótast tilber.

Cosméto

Niels Finsensgøta 38 kj.
FO-100 Tórshavn
Tlf. 318070



# Til sølu

Ein Iveco lastbilur við alminiumskassa og lift, árg. 95 til sølu.

**Tlf. 218811**


# Runavíkar kommunuskúli

## Skúlastýrisval týsdagin 25. mai

Val av foreldraumboðum í skúlastýrið fyri Runavíkar kommunuskúla verður **týsdagin tann 25. mai 2004 frá kl. 14.00 til kl. 20.00 í Ítróttarhøllini í Runavík (forhøllini).**

**Valevnislisti:**
Meinhard Bjartalíð, Lambi
Bill Justinussen, Glyvrar
Eyðun Petersen, Søldarfjørð
Sólfríð Petersen, Glyvrar
Malan Rasmussen, Søldarfjørð
Ása Sevdal, Runavík

**f. Valnevndina**
**Ásmund Lamhauge, skúlastjóri**
Tlf. 447331 og 217331